GJALDSTOVAN

Til stovnar, sum skráseta í BSL

Argir: november 2023
FGj. j.nr.:
(at tilskila í svari)
Tygara j.nr.:

## Avseting, í landsroknskapinum 2023, móti tapi av debitorum

Gjaldstovan fer at biðja stovnsleiðaran um at gera upp tann partin av skuldarunum, sum verður mettur virðisleysur og føra henda partin sum avseting móti tapi, soleiðis at roknskapurin fyri stovnsnummarið gevur eina rættvísandi mynd.

Avsetingin er ein rein finansbóking, og sjálvt kravið mótvegis borgara/virki verður ikki slept, fyrrenn kravið hevur mist rættargildið ella er goldið.

Tað er stovnurin, sum skal meta um væntaða tapið. Vegleiðandi í so máta er:

- Hvussu stór eftirstøðan er, og um talan er um munandi ella týðandi upphædd í mun til virksemi stovnsins.
- Hvussu gamlar eftirstøðurnar eru.
- Hvussu skuldarin hevur røkt sínar fíggjarligu skyldur áður.
- Hvussu lítið sannlíkt tað er, at eftirstøðan verður goldin.
- At kreditvirðið er kannað. T.d. gjaldsførleikin er kannaður hjá skuldaranum við at hyggja at eftirstøðuni í mun til rakstur og fíggjarstøðu hjá skuldaranum.

Serlig viðurskifti:

- Er kravið MVG-skyldugt, verða 80% av upphæddini sett av móti tapi.

Stovnsleiðarin verður biðin um at fylla út viðlagda bókingarskjal (EK 27.15), skriva tað undir og senda Gjaldstovuni tað við upplýsingum um, hvørja støðu stovnurin hevur tikið viðvíkjandi avseting fyri 2023. Skjalið eigur at verða sent Gjaldstovuni fyri 1. februar 2024.

---
Gjaldstovan minnir stovnarnar á, at skriva út rokning til viðskiftafólk er ikki einsmerkjandi við, at ”peningurin er í kassanum”, hóast inntøkan beinanvegin verður góðskrivað rakstrinum hjá stovninum.

Vanlig mannagongd er, at tá ið gjaldsfreistin er farin, verður áminning skrivað út úr debitoraskipanini. Síðani kemur kravið við á tær áminningar, sum verða skrivaðar hvønn mánað, til kravið er bókað sum goldið.
Tað liggur á stovninum, ið eigur kravið, at bera so í bandi, at tað verður goldið, og at kravið verður sent til innheintingar, um tað er neyðugt.

**Kvíggjartún 1 · Postsmoga 2009 · FO-165 Argir · Telef (+298) 352400 · Fax (+298) 352401 · E-mail gjaldstovan@gjaldstovan.fo**

Í hjálagda greinaða skuldaralista hava vit sett merki við krøv, sum vit halda, at stovnurin skal taka støðu til, hvørt sett skal verða av til tap. Í einstøkum førum hava vit gjørt vart við, at kravið eigur at verða avskrivað, tí tað er fallið fyri fyrningarfreistini.

Í viðløgdum skjali verður yvirskipað greitt frá um fyrning av krøvum, ið eru fyri sølu av vørum og tænastum.

---
Í rundskrivi frá Lønardeildini ”um tænastuferðir uttanlands” er ásett, at ferðauppgerðir skulu verða gjørdar upp og møgulig restupphædd goldin aftur innan 3 vikur eftir heimkomu.

---

g.v.

Gjaldstovan

**Kvíggjartún 1 · Postsmoga 2009 · FO-165 Argir · Telef (+298) 352024 · Fax (+298) 352034 · E-mail gjaldstovan@gjaldstovan.fo**